Sjálvstýri, sosial trygd og framburður

Samgonguskjalið 2002 - 2006

Samgonguskjal dagfest 29. mei 2002 millum Fólkaflokkin, Sjálv-stýrisflokkin, Tjóðveldisflokkin og Miðflokkin.

SAMGONGUSKJALIÐ 2002

Fólkaflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin, Tjóðveldisflokkurin og Miðflokkurin eru samdir um at skipa landsstýri og politiska samgongu á løgtingi. Samgongan hev-ur sum mál at skipa breitt samstarv við allar flokkar á løgtingi.

Ríkisrættarliga støðan

Endamál samgongunnar er, at Føroyar gerast sjálvbjargnar, so Føroya fólk uttan figgjarligar og umsitingarligar bindingar kann gera av framtíðarstøðu sína.

Samgongan hevur sum grundarlag, at Føroya fólk er tjóð við ómissandi og framhaldandi sjálvavgerðarrætti og er samd um í eini tryggari sjálvstýristilgongd í valskeiðnum 2002 – 2006 at virka fyri:

• at tað verður Føroya Løgting, sum ger av, at øll málsøki, undantikið tey, sum eru knýtt at suverenitetinum, kunnu yvirtakast sum sermál
• at har vit valda, skulu vit gjalda

Samgongan ætlar í hesum valskeiði at yvirtaka hesi málsøki undir føroyskt málsræði: Familjurættarmál, havumhvørvi, kortlegging, upphavsrætt, vinnulóggávu, tilbúgving, veðurtænastu, vitaverk, uppmerking, fjølmiðlaábyrgdarlóg og arbeiðs- og uppihaldsloyvi. Umsitingin av tinglýsingini verður yvirtikin.

Fólkakirkjan verður í samstarvi við allar partar í føroysku kirkjuni yvirtikin, so hon kann halda fram í verandi bygnaði, og meirútreiðslur í samband við yvirtøku verða goldnar av landskassanum.

Útbyggingarætlan fyri Vága Floghavn verður gjørd, og tryggjaður verður sunnur rakstrarbygnaður saman við figgingarætlan, so floghavnin kann útbyggjast og yvirtakast.

Arbeiðið at yvirtaka loftferðslumyndugleikan heldur fram.

Arbeiðið at yvirtaka løgreglu og rættarskipan heldur fram í neyvum samskifti við allar partar á økinum.

Allar yvirtøkur verða neyvt fyrireikaðar í samskifti við allar avvarðandi partar og neyvar umsitingar- og figgjarætlanir gjørdar og lagdar fyri løgtingið, áðrenn yvirtøkan verður framd.

Arbeiðið í grundlógarnevndini heldur fram.

Uttanríkismál

Samgongan hevur sum mál at vinna Føroyum veruliga uttanríkispolitiska ávirkan og at fyrireika egnan uttanríkispolitikk.

Føroyskir myndugleikar skulu eftir greiðum reglum tryggja sær fult innlit í og avgerðarrætt á øll uttanríkis- og verjupolitisk mál, ið kunnu hugsast at hava týdning fyri Føroyar og føroyingar.

Umboðan Føroya í fleirtjóða og altjóða felagsskapum verður styrkt.

Arbeitt verður fyri sjálvstøðugum limaskapi í Norðurlandaráðnum. Útnorðursamstarvið verður styrkt. Samstarvið við grannatjóðir og grannaøkir kring alt Norðuratlantshav verður ment.

Hermálsliga og trygdarpolitiska støða Føroya verður framhaldandi útgreinað.

Ein politikkur við greiðum málsetningum fyri menningar- og neyðhjálp verður orðaður og raðfestingar á figgjarlógini gjørdar samsvarandi.

Búskapar- og figgjarmál

Førdur verður ein varin og ábyrgdarfullur búskaparpolitikkur.

Grundstøðið undir búskapinum er framleiðsluvirðið í landinum. Politiska endamálið vid figgjarpolitikkinum er at laga føroyska búskapin til ein sjálvberandi búskap, har:

• allir borgarar hava javnbjóðis møguleikar,
• vælferðin hjá føroyingum verður ment,
• samfelagnum verður tryggjað eitt sunt støði fyri sjálvsmenning og búskaparligum sjálvbjargni,
• javnvág verður millum privat og alment fyritaksemi og íløgur.

Búskaparliga skal munurin millum inntøkur og útreiðslur á figgjarlógini vaksa positivt á hvørjum ári.

Miðað verður eftir at gjalda niður skuld skjótari enn ætlað.

Blokkstuðulin verður fastfrystur.

Búskapargrunnur verður settur á stovn.

Virðisbrævamarknaður verður stovnsettur.

Almennar langtíðar íløguætlanir skulu gerast og fylgjast í verki.

Lóg um útistandandi áogn landskassans verður gjørd.

Til at nøkta hølistørvin á ymsum økjum í samfelagnum eiga møguleikarnir fyri nýggjum reglum og ognar- og figgingarhættum at verða royndir.

Skatta- og tollmál

Skatta- og avgjaldspolitikkurin skal eggja til, at tað loysir seg at arbeiða, framleiða, spara saman og gera íløgur.

Samgongan er samd um, at neyðugt er at linka skattin til at lætta um hjá familjum og einstaklingum, til at lækka kostnaðarstøðið og til at bøta realønina og styrkja kappingarførið. Tí verður botnfrádrátturin hækkaður og allir prosentsatsir á skattaskalanum stigvíst lækkaðir, serliga hjá lág- og meðalinntøkum.

Marginalskattamarkið verður stigvíst hækkað til at liggja oman fyri sáttmálaløninа hjá verkafólki.

Sum eitt serstakt mál verður samstarv tikið upp við partarnar á arbeiðsmarknaðinum til at leggja fram ætlan fyri skattapolitikkin og at fáa samstarv um framtíðar skattapolitisku ætlanirnar og uppskot til nýggja eftirlønarskipan.

Meirvirðisgjaldsskipanin og punktgjøldini verða endurskoðað.

Almenna fyrisitingin

Nevnd verður sett at endurskoða almenna bygnaðin við tí endamáli at gera uppskot til ódýrari og einfaldari rakstur og betra tænastuna til borgaran. Herundir verður eisini hugt at fyrisitingarlógini og lógini um alment innlit.

Kommunumál

Kommunala sjálvstýrið og ábyrgdin skulu styrkjast við greiðari skilnaði millum lands- og kommunuuppgávur.

Við støði í álitinum um greitt uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur verður neyv ætlan gjørd fyri at leggja størri ábyrgdarøkir til komunurnar, og semja verður gjørd um íløgu- og skattabýtið.

Hergeir Nielsen úr Tjóðveldisflokkinum hevði verið tingformaður, um nýggja samgongan hevði verði samd fyri tingfundin 15. mai. Her er hann í ferð við at sortera eitt av útkastunum til samgonguskjalið undir samráðingunum seinastu samdøgrini

Trivnaðarmál Familjumál

Familjan er kjarnin í samfelagnum, og tí eiga lógir, sum ikki samsvara við hesa grundreglu, framhaldandi at verða broyttar, so tær eru við til at fjálga um familjuna, eisini tey, sum hava mist part av familjuni.

Skatta- og almannalógir eiga at vera so familjuvinarligar sum gjørligt.

Lóggávan má stuðla virkjum og stovnum til at føra ein familjuvinarligan starvsfólka-politikk.

Barnafrádrátturin verður hækkaður.

Arbeitt verður fyri at avmarka talið á fosturtøkum. Neyðug ráðgeving, leiðbeining og hjálp eigur at verða veitt mammum/foreldrum í sambandi við barnsburð.

Rikin verður ein rúsevnapolitikkur, sum hevur til endamáls at fyribyrgja og minka um rúsevnamisnýtsluna.

Fyribyggjandi tiltøk móti og miðvís upplýsing um skaðaárin av rúsdrekka- og rúsevnamisnýtslu eigur at verða styrkt í skúla og fjølmiðlum.

Heilsumál

Heilsuverkið skal mennast, til tað er á hægst møguligum altjóða støði í góðum samstarvi við útlendsk heilsuverk.

Ein heilsupolitikkur verður orðaður, ið setur greið mál fyri heilsutænastuna og sum ásetur uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum sjúkrahúsini og millum sjúkrahús og primeru heilsutænastuna.

Kommunulæknaskipanin skal endurskoðast við atliti til læknatrotið. Nýggj skúlalæknaskipan verður gjørd.

Økismenning

Besta grundarlagið undir samfelagnum er virksemi og trivnaður á øllum plássum í landinum.

Økismenning og útoyggjapolitikkur verða skipað undir ávísum landsstýrismanni.

Við støði í álitinum um økismenning og útoyggjapolitikk verður ætlan løgd fyri, hvussu tilmælini kunnu verða fylgd.

Miðað verður ímóti, at allir borgarar landsins fáa nøktandi tænastustig innan vinnu, telesamskifti, samferðslu, heilsu-, almanna- og menta- og skúlamál.

Miðað verður eftir, at møguligir nýggir almennir stovnar verða lagdir kring landið.

Í samstarvi við partarnar á arbeiðsmarknaðin verður skipað fyri, at ferðslan um firðir og sund gerst óheft av ósemjum á arbeiðsmarknaðinum.

Flutningskostnaður skal sum minst darva kappingarførinum hjá vinnulívinum í útjaðaranum.

Trivnaðarmál

Anfinn Kallsberg heldur fram í fremstu rød, nú nýggj samgonga er komin undir land. Bjarni Djurholm og Jørgen Niclasen halda uttan iva eisni fram sum landsstýrismenn við ávikavist fiskivinnu- og vinnumálum

Mynd: Jens Kristian Vang

Miðast skal ímóti at fylgja tilmælunum í álitinum um heildarpsykiatri.

Skipast skal venjingarmiðstøð fyri langtíðarsjúklingar.

Sjúkrakassaskipanin verður endurskoðað og møguliga umskipað.

Lóggevast skal um ílegu- og biotøknigransking í Føroyum.

Sjúkrahúsini verða um- og útbygd sambært langtíðarætlanum.

Almannamál

Almannaverkið verður gjørt einfaldari og betri. Fólk, ið gerast heft at almannaverkinum, skulu í størst møguligan mun stuðlast at koma úr aftur skipanini.

Nýggj sosiallóggáva skal gera sosialu trygdarskipanina einfaldari og nærri brúkarunum.

Almannaverkið skal – saman við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum – tryggja fólki við skerdum arbeiðsevnum og sosialum tørvi atgongd til útbúgvingar og/ella arbeiðsmarknaðin.

Íbúðartørvurin hjá fólki við serligum áneyðum verður loystur við raðfestari íløguætlan.

Samdøgurstovnar til evnaveik, menningartarnað, fjølbrekað og sálarsjúk skulu byggjast, og dagstovnatilboð eftirmetast.

Skipanin við hjálpartólum verður endurskoðað. Tøkniligu tilboðini til fjølbrekað verða raðfest ovarliga.

Eldraøkið

Eldraøkið skal – í semju við kommunurnar – skjótast gjørligt leggjast til kommunurnar, og skattalykilin broytast samsvarandi øktu figgjarbyrðini.

Bráneyðugi tørvurin á eldrabústøðum, ellis- og røktarheimsplássum skal – í samstarvi við kommunurnar – nøktast eftir galdandi skipan. Hóskandi upphædd verður sett av til endamálið. Kommunurnar taka stig til bygging.

Heimarøktin skal beinan vegin víðkast til at umfata samdøgursrøkt.

Bústaðarpolitikkur

Land og kommunur ganga saman um at orða ein bústaðarpolitikk.

Fyri at økja útboðið av bíligari leigubústøðum verður kannað, hvussu inntøka frá útleigu av parti av egnum bústaði kann verða skattað lagaligari.

Nýggja leigulógin skal tryggja leigara og útleigara rættindi og skyldur.

Alternativ bústaðarbygging verður framd við tøkum vinnuligum og almennum figgingarmøguleikum. Lógin um Húsalánsgrunnin verður broytt, so hann eisini kann taka lut í hesum.

Fiskivinnupolitikkur

Høvuðsendamálið við fiskivinnupolitikkinum er, at ríkidømið í havinum verður umsitið sum varandi grundarlag undir búskapinum.

Fiskivinnan skal standa á egnum beinum uttan almennan stuðul, og fiskastovnarnir skulu gagnnýtast á sunnum vinnuligum og lívfrøðiligum grundarlagi.

Framtøk skulu gerast innan útbúgving og gransking í samstarvi við vinnuna til at økja um útrøkuna og at eggja ungfólki at starvast í hesi vinnu í menning.

Hildið verður fast við fiskidagaskipanina, og økis- og gýtingarfriðingarnar verða varðveittar.

Miðað verður eftir at gera skipanina fyri útróður einfaldari við tí endamáli, at útróðurin sum vinna og fólkamentan kann mennast kring landið.

Fult gjøgnumskygni skal vera við fiskirættindunum, har brúksskyldur fylgja við brúksrætti til fiskatilfeingi. Tiltøk til at forða "spekulatión" við fiskirættindum verða støðugt ment og sett í verk.

Fiskivinnuni á landi skulu skapast fríir og javnbjóðis kappingarmøguleikar.

Samstarvið við okkara grannalond um sínámillum fiskirættindaásáttmálar á høgum støði skal halda fram, so at vánaligur fiskiskapur á einum øki ávirkar búskapin sum minst.

Kunngerð um arbeiðsumhvørvi umborð á skipum verður gjørd í samráð við vinnuna og sett í verk.

Føroyska altjóða skipaskrásetingin skal styrkjast, so hon kann gerast ein inntøkukelda aftrat hjá landshúsarhaldinum.

Vinnupolitikkur

Virkað verður fyri einum sjálvberandi búskapi, har vinnur av ymsum slagi geva avkast, framburð og vælferð í friari, altjóða kapping, og har trivnaður og umhvørvi verða raðfest ovarlaga.

Nýggjar vinnur

Miðast skal eftir, at kunningartøkni, bio- og gengransking verða hornasteinar í bú-skapinum, har samanrenning millum vitan, samskifti og kunningartøkni verður ásin, sum framburðurin á økinum melur um.

Kreativar vinnur skulu mennast.

Byggjast skal starvsstova, har sjúkrahús, apotek, Heilsufrøðisliga Starvstovan, Elek-tron, aðrar teldu-fyritøkur og privatir íleggjarar samstarva á felags palli innan gen-gransk-ing, lívfrøði og evnafrøði.

Til at fáa fleiri útlendsk vitjandi higar, eigur ferðavinnan at stimbrast, so hon gerst kapp-ingarfør við ferðavinnuna í grannalondunum.

Landbúnaðarlóggávan verður endurskoðað.

Aðrar vinnur

Tá virðisbrævamarknaður er settur á stovn, verður farið undir varliga og gjøgn-um-skygda einskiljing av vinnuligu fyritøkunum hjá landinum.

Partabrøv í fyritøkunum kunnu eftir greiðum reglum og fullum gjøgnumskygni verða boðin til sølu. Møguligt søla av partabrøvum eigur at órógva virksemið í fyritøkunum minst møguligt. Sølan skal geva fullan vinning og fult endur-gjald fyri kreppuloysn-irnar.

Almennar fyritøkur kunnu, um løgtingið samtykkir tað, selja ella skipa fyri ný-tekning av partabrøvum, sum verða boðin út – lutvíst sum starvsfólka-partabrøv, til almenningin og/ella til strategiskar íleggjarar.

Málið er, at landskassin fær sum mest burturúr, og at selt verður til hægstbjóðandi.

Peningurin kann nýtast at gjalda niður almennu skuldina.

Alivinnan

Alivinnan skal vera búskapar- og umhvørvisliga sjálvberandi, skal hvíla í sær sjálvari og vera grundarlag undir viðari menning av dygdarvørum, sum skapa inntøkur í al-tjóða kapping. Alivinnan skipar seg sjálv, frá smoltaling til marknaðarføring.

Skattliga skal føroyska alivinnan ikki vera verri fyri enn útlendsku kappingarneytarnir.

Hildið verður fast við, at útlendski eigaraparturin í alivinnuni ikki verður við-kaður.

Kynsbót, eftirlit og sjúkufyribyrging verður stuðlað í sama mun sum hjá okkara kapp-ingarneytum. Virkast skal fyri at menna granskíng og aling av oðrum fiska-sløgum.

Sandoyggin er lívfiskaøki, og verður virkað fyri at menna oynna sum slíka.

Samferðslu- og samskiftismál

Landsstýrið hevur skyldu at tryggja hóskandi ferða- og flutn-